# Ólavur Presley og skitnu kloddafylini full speed á kassan

**Ólavur Presley and his dirty rag rags hava fingið eitt av heitastu plássunum á Summarfestivalinum - ímillum Hensley og Boney M. Og Ólavur lovar onki minni enn eitt kókandi show leygarkvøldið**

SUMMARFESTIVAL
*Anna V. Ellingsgaard, anna@sosialurin.fo*

- Nervøsir? Absolutt ikki, tú. Vit er so garvaðir og professionellir, at tað rørir okkum ikki at spæla fyri allari Klaksvíkini og øllum Føroyum, um tað skal vera.

Ólavur Presley er í toppformi og sitrar longu av spenningi, til hann og hansara skitnu kloddafyl sleppa á pallin í Vágsbø leygarkvøldið. Hann hevur kannað skránna, og heldur plaseringina hjá raggarnum ímillum Ken Hensley og Boney M vera sera hóskandi.

- Tað skuldi ikki verið neyðugt at givið okkum ein upphitara, tí áhoyrarnir byrja at kóka, bara vit eru í nánd, men lat bara Hensley royna. Og so er tað nokk skilagott at lata Boney M taka dampin eitt sindur av aftur, so vandi ikki verður á ferð, heldur Ólavur.



*Ólavur Presley vil ikki avdúka, um hann fer at vera í reyðum G-strongi, tá hann og hansara dirty rag rags fara á pallin í Vágsbø leygarkvøldið*

### Ólavur í reyðum G-strongi?

Ferðin sær út til bara at vera økt hesi meir enn 30 árini, síðani Ólavur Presley and his dirty rag rags stóðu á palli fyrstu ferð á Beatfestivalinum í Klaksvík í 1972. Ólavur vil vera við, at tað vóru teir, sum uppfunnu festivalhugtakið í Føroyum, og at klaksvíkingar ongantíð høvdu upplivað eina líknandi framførslu. Og so var ongin vegur aftur. Árið eftir máttu teir endurtaka beatbrestin á Glyvrum, sjálvsálitið var í topp, og Ólavur hevði rættiliga fingið blóð uppá tonna.

- Ta ferðina hongdi eg meg á pallinum og byrjaði samstundis mína stripparakarrieru. Myndirnar av mær í reyðum undirbuksum fóru sum eldur um alt landið, skal eg siga tær.

*Eg haldi, eg havi sæð onkra. Men tær vóru also ikki serliga sexutar, hasar undirbuksirnar ...*

Ná? Tað voru tær sanniliga tá, men tá vóru tíverri ongir G-strongir til. Fólk eru so forvand nú á døgum.

*Skulu vit so vænta at síggja Ólavur Presley í reyðum G-strongi leygarkvøldið?*

- Tað tori eg ikki at avdúka her, tí kanska konan lesur hetta. Men tit kunnu vænta meg og raggarnir full speed á kassan við okkara sermerkta og vælumtókta ragstíli a la Johnny B. Good, "Mín dingeling" o.s.fr, og so okkara sera progressivu, rockifiseraðu útgávu av "Lambið sigur mæ, mæ". Restina fari eg ikki at avdúka frammanundan - men eitt show, sum ongin annar fær hamla upp við. Tað er so púra vist.

### Skræddu skjúrtuna

Sambært Ólavi hava hann og "the rag rags" kollvelt føroyska rockheimin fleiri ferðir síðani tá, fyrst í 70-unum. So seint sum í 1999 tóku teir allan kommunuskúlagarðin, sum hann var, fullkomiliga á bóli á Ólavsøkukonsertini.

- Tey ungu vóru púra garvill.Tey skræddu skjúrtuna av mær, og vildu hava okkum at skriva autografar á pettini, og vit sluppu næstan ikki av pallinum aftur. Tanks og MC-Hár og allir hinir kundu gott pakka saman, tí teir fingu yvirhøvur ikki fylgt við. Men tað kundu teir ikki gera við, tí ongin hevur ein fjepparaskara, sum okkara, og hann bara vaksur, tí fleiri ung leggjast til fyri hvørja konsert

Ja, ilt er at gita, hvat tað fer at enda við, men raggarnir hava ongar ætlanir um at leggja seg at hvíla á laurberunum enn á sinni. Ólavur veit ikki rættiliga, hvat jubeleum, teir kunu halda í ár, men hann er errin av at avdúka, at aldurin á teimum ymsu raggarnir er:

Ólavur og Elisar 55, Hanus 54, Sonhard og Rudolf 50, og so Jóhannes, sum tann einasti undir 50.

# Marinari í læknastríðnum vitjar aftur

**Tað vakti gomul minni, tá 71 ára gamli Svend Jensen úr Hirtshals kom til Klaksvíkar í gjár. Seinast hann silgdi inn eftir Vánni, var nevniliga mitt undir læknastríðnum, tá hann var hermaður í donsku sjóverjuni**

VITJAN
*Anna V. Ellingsgaard, anna@sosialurin.fo*

- Eg kendi keiina og Kjølbrohúsið aftur beinanvegin, men annars er alt ótrúliga nógv broytt, sigur 71 ára gamli Svend Jensen. Tað eru 49 ár síðani Svend var í Klaksvík seinast, tá hann sum 23 ára gamal silgdi við donskum sjóverjuskipi í Føroyum í eitt ár. Men sjálvt um læknastríðið leikaði harðast á, meðan hann var í Klaksvík, hevur Svend bara góð minni frá tíðini í Føroyum.



*Seinast, Svend Jensen úr Hirtshals var í Klaksvík, var meðan læknastríðið leikaði á. Hesuferð var tað konan Annelise, sum fekk túrin til Klaksvíkar í føðingardagsgávu*

### Føðingardagsgáva til konuna

Frá hendingunum í Klaksvík minnist Svend best alt fólkið, sum var á keiini, og at endarnir, sum Tjaldrið lá bundið við, knappliga vórðu kvettir. Teir vistu, hvat stríðið snúði seg um, men Svend heldur ikki, teir rættiliga skiltu, hví ein einstakur lækni kundi skapa so mikla øsing millum klaksvíkingar.

- Á ja, vit vóru ungir og lættir í sinnið, og tað var ikki sørt, at vit hildu alt hetta vera eitt sindur fjákut, sigur Svend og smílist við minnini.

Seinni hevur Svend tó lisið nógv um læknastríðið í Klaksvík, og meir enn einaferð hevur konan Annelise hoyrt søguna um, tá Svend og hinir marinarnir hildu vakt, so klaksvíkingar ikki lupu framav. Endin var, at Annelise setti uppá at sleppa at síggja Føroyar og serliga Klaksvík, tá ráðini og tíðin einaferð vóru til tað. Og nú helt Svend røttu løtuna vera komna. Annelise fylti 60 ár herfyri, og Svend gav henni og sær sjálvum ein túr til Klaksvíkar í føðingardagsgávu.

### Góð minni

- Sum sagt, er býurin nógv broyttur, men klaksvíkingar eru líka gestablíðir og fryntligir, sum eg minnist teir fyri næstan 50 árum síðani. Eg minnist, at teir flestu av okkara vinmonnum, sum silgdu aðrastaðni, taldu dagarnir, til teir vórðu sendir aftur til Danmarkar. Men vit, sum vóru í Føroyum, trivust óføra væl og vórðu ikki sørt nipnir, tá vit brádliga fingu boð um, at nú skuldu vit heimaftur, sigur Svend.

Svend Jensen fann sær ikki eina unnustu í Føroyum, sum nógvir av hinum, men eitt lítið petti av hjartanum man hava ligið eftir, tí dreymin um at vitja aftur slepti hann ongantíð. Og hesuferð var tað borgarstjórin, sum tók ímóti, áðrenn Svend bjóðaði konuni út á Sjómannsheimið til ein góðan føðingardagsdøgurða.



# Ónærisligar slóðir á føroyskari heimasíðu

**Ein tann av føroyskum ungdómum mest vitjaða føroyska heimasíðan, www.vitin.fo, hevur á forsíðu síni beinleiðis slóð til sera ónærisligar heimasíður uttan fyri landoddarnar**

ALNETIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nógv verður tosað um, at tað er umráðandi at forða fyri, at børn skulu hava atgongd til heimasíður, ið hava beinleiðis ónærisligt og pornografiskt tilfar. Heimasíðan www.vitin.fo er ein tann best umtókta heimasíðan hjá føroyskum børnum og ungdómum, og á hesari síðu er beinleiðis slóð til eina serstakliga ónærisliga heimasíðu við pornografiskum tilfari.

Umrødda føroyska heimasíðan er, sum áðurnevnt, sera væl umtókt millum ung, og ein av høvuðsorsøkunum er, at her ber til at síggja myndir av ungum í býarlívinum í Havn og aðrastaðnis í landinum.



*Nógv ung vitja føroysku heimasíðuna, sum hevur beinleiðis slóð til groft pornografiskt tilfar*

### Einki eftirlit

Á omanfyri nevndu heimasíðu ber tað til hjá einum og hvørjum at tilmelda slóðir til aðrar heimasíður. Tað hevur onkur persónur so gjørt, og fyri at gera fólk forvitin, hevur slóðin til nógv umtalaðu heimasíðu fingið »ymiskt skemt«. Hetta heitið fær óivað fólk at forvitnast, men verður trýst á slóðina, kemur eina rúgva av kassum fram við pornografiskum myndum.

Spurningurin er so, um einki eftirlit er við, hvørjar heimasíður verða tilmeldaðar www.vitin.fo, men hesin spurningur stendur ósvaraður, hóast nógv kundi bent á, at so er. Vit hava roynt at fingið fatur á teimum, ið hava ábyrgd av www.vitin.fo, men tað hevur ikki eydnast okkum, hóast nógvar royndir hava verið gjørdar.

Heimasíðan hevur verið til í fleiri ár, og á henni ber eitt nú til at síggja tilboð, sum handlar kring landið hava, og eisini kann man lesa veðurtíðindi á síðuni. Harafturat ber eisini til altíð at síggja nýggjastu tíðindini frá Norðlýsinum á hesari síðu.

## Kanna málið beinanvegin

**Løgreglan í Havn visti einki um slóðina á www.vitin.fo, men farið verður undir at kanna málið beinanvegin**

LØGREGLUMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á kriminaldeildini hjá løgregluni í Havn vistu teir einki um, at føroyska heimasíðan www.vitin.fo hevur beinleiðis slóð til pornografiskar heimasíður uttan fyri land-oddarnar. Virkandi leiðarin á kriminaldeildini, Georg Otthamar, sigur, at tað er ólógligt hjá føroyskum heimasíðum at hava slóðir til ella reklamera fyri pornografiskt tilfar, og tí verður beinan vegin farið undir at kanna málið. Georg Otthamar sigur, at tað er ikki loyvt føroyskum avísum, tíðarritum, heimasíðum og øðrum miðlum at prenta ella lýsa við pornografiskt tilfar, og tí fer løgreglan í Havn beinan vegin í holt við málið.

# Samstarvið steðgar

**Ábyrgdarblaðstjórin á Norðlýsinum, Olivur Joensen, sigur, at um www.vitin.fo hevur slóðir til pornografiskt tilfar, so steðgar samstarvið við Norðlýsið beinanvegin**

SAMSTARV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á www.vitin.fo er nógv ymiskt tilfar. Tað er ikki einans slóðir til pornografiskar heimasíður, tí eisini ber til at lesa veðurtíðindir, onnur tíðindir, síggja myndir úr býarlívinum og mangt annað. Tíðindini, ið kunnu lesast á heimasíðuni eru frá heimasíðuni hjá Norðlýsinum í Klaksvík, men ábyrgdarblaðstjórin á Norðlýsinum vil ikki hava, at blaðið verður sett í samband við pornografiskt tilfar.



*Ábyrgdarblaðstjórin á Norðlýsinum, Olivur Joensen, sum her er avmyndaður saman við soninum John William, sigur, at samstarv teirra við www.vitin.fo steðgar beinanvegin*

### Dámar okkum ikki

Olivur Joensen sigur, at teir, ið standa aftan fyri heimasíðuna, spurdu leiðsluna á Norðlýsinum, um teir kundu fáa loyvi til at nýta nýggjastu tíðindini á heimasíðu blaðsins. Hetta játtaði Norðlýsið tá, men um so er, at www.vitin.fo hevur slóðir til pornografiskt tilfar, so skal samstarvið steðgast beinanvegin, sigur Olivur Joensen.

– Vit vilja ikki, at tíðindir úr okkara blað verða at lesa á einari heimasíðu, sum samstundis hevur pornografiskar slóðir, tí tað dámar okkum ikki, sigur ábyrgdarblaðstjórin á Norðlýsinum. Hann sigur, at Norðlýsið beinan vegin fer at seta seg í samband við persónararnar, ið standa aftan fyri heimasíðuna og boða teimum frá, at samstarvið teirra millum skal steðgast beinanvegin.

TILBOÐ
so leingi vøra er á goymslu



GOSBAÐ
• Við 10 jetdysum og frontpanel. Uttan armatur
• Veitingartíð 4-6 vikur
vanligur prísur 11.498,-
BERT 9.598,-
spar 1.900,-



BAÐIRÚMSMØBIL
• Hvítt, 88 cm
• Undirskáp H:55xB:60,5xD:31,5 v/ 2 hurðum, hvítt vask, spegl og baldakin
• Háskáp H:172xB:27,5xD:28 v/ 2 hurðum
• Uttan blandingsbattarí
BERT 2.298,-



BAÐIRÚMSMØBIL
• Undirskáp H:62xB:90xD:34 v/ vaski í høgru síðu, skuffa og 3 hurðar við handtøkum
• Yvirskáp við glashurð og 2 glashillum, spegl, hill og ljós
• Uttan blandingsbattarí
BERT 3.498,-



VALNØT BORÐPLÁTA
• Massiv borðpláta. 62x302 cm
BERT 1.198,-

damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 31 54 15 • FAX 31 90 01